# portal.fo nógv flestar vitjanir

**Vevsíðan portal.fo er nógv mest vitjaða føroyska heimasíða á alnetinum. Hon hevur meiri enn 30.000 fleiri brúkaravitjanir enn sportal.fo, ið liggur nummar tvey**

VEVSÍÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vevmátingarlistin, sum Gallup Føroyar ger hvørja viku, er hugaligur lesnaður fyri tey, ið hava við portal.fo at gera. Tí hendan heimasíðan er hin nógv mest vitjaða føroyska heimasíðan á alnetinum.

Fyri viku 34 er talið á vitjandi brúkarum 44.658. Hesir brúkarar hava vitjað portalin 407.750 ferðir og hava í meðal verið inni á meiri enn fimm síðum hvør, tað er 2.131.007 sýndar síður. Talan er um met í brúkarum og vitjanum.

Talan er um eina øking í brúkarum upp á 2,0%, 1,6% øking í vitjanum og heili 9,5% fleiri sýndar síður í mun til vikuna undan.

Hinvegin er hetta ikki met, tí portalurin hevur verið uppi á heilum 2,8 milliónum sýndum síðum í einari viku.

Næststørsta heimasíða í brúkarum er sportal.fo, við 14.206 brúkarum. Men her eru aðrar síður framman fyri í vitjanum og sýndum síðum. Tað er Sosialurin, sum røkir portal.fo, sportal.fo og planet.fo fyri Føroya Tele.

Her er yvirlitið yvir tíggju tær mest vitjaðu heimasíðurnar í viku 34, sambært Gallup Føroyar:

| Heimasíða | brúkarar | vitjanir | sýnd |
|---|---|---|---|
| 1. portal.fo | 44.658 | 407.750 | 2.131.007 |
| 2. sportal.fo | 14.206 | 31.560 | 51.694 |
| 3. uf.fo | 12.636 | 41.285 | 124.585 |
| 4. planet.fo | 11.917 | 24.671 | 88.517 |
| 5. nummar.fo | 11.739 | 30.441 | 99.212 |
| 6. vikublad.fo | 6.801 | 34.567 | 77.161 |
| 7. dimma.fo | 6.385 | 19.681 | 83.067 |
| 8. nordlysid.fo | 5.636 | 19.590 | 154.903 |
| 9. kvinna.fo | 4.627 | 17.057 | 91.891 |
| 10. nym.fo | 3.226 | 9.559 | 80.415 |




**Flemming Østergaard og Jens Kramer Mikkelsen fyrilestrar á Hotel Føroyum**




**FC Amager og Team Føroyar Business Club skipa hósdagin 13. september fyri serligum tiltaki á Hotel Føroyum.**
Tiltakið byrjar kl 17.00

Flemming Østergaard: "FCK A/S, rentabel professionel fodbold i verdensklasse"
Jens Kramer Mikkelsen: "Ørestaden, en ny bydel i København. Fra mark til en af Europas moderneste bydele"

Náttúrði er við í prísinum.
**Kostnaður fyri hvønn: 950 kr.**

Pláss er einans fyri 450 gestum til hetta serstaka tiltakið.

**Bílegg agongumerki á www.eik.fo. Forsølan byrjar mikudagin 29. aug. kl 10.00.**